## Alivinnan í Kanada setir met

Rakstrarinntøkurnar hjá kanadiska aliídnaðinum settu met í 2005. Orsøkin er økt framleiðsla og øktur útflutningur.

Við hesum steðgaði afturgongdin, sum var í kanadisku alivinnuni í 2004 og 2003.

Sølan í 2005 var 753 mió kanadiskir dollarar, og hetta var samstundis 11% betri enn í 2004.

Útflutningsvirðið hjá kanadisku alivinnuni í 2005 vaks við 22% og kom upp í heilar 515 mió kanadiskar dollarar, sum er met.

**-vilmund.**





# Skipini mistu 2,5 mió kr. í søluvirði mánadagin

**- Við teimum prísum, sum skipini fingu fyri fiskin mánadagin, tá ið eingin flutningur var av landinum, havi eg roknað út, at tey mistu umleið 2,5 mió krónur, sum eingin trygging dekkar, sigur fiskaseljari, sum Sosialurin hevur tosað við**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað kom dátt við hjá skipum og fiskaútflytarum – men minni dátt við hjá virkjum - at eingin sigling var niður til Scrabster við feskfiski mánadagin, tá ið Lómur var so seinur aftur úr Danmark.

Fiskaseljari, sum Sosialurin hevur tosað við, sigur, at honum kunnugt var talan um 300 tons av ymiskum fiskasløgum, sum skuldu av landinum við Lómi hendan dagin.

### Stórur missur

- Fiskakeyparar keyptu fisk á marknaðinum fríggjadagin við tí fyri eyga at senda hann feskan niður á skotska marknaðin. Men hetta kiksaði so fullkomiliga, tá ið Lómur ikki náddiu havn í Føroyum fyrr enn út á kvøldið - og Faroe Ship síðan avgjørdi at avlýsa ferðina til Scrabster.

Fiskaseljarin sigur, at hann hevur hugt at prísunum, sum skipini fingu á uppboðssølu og til ymisk virkir mánadagin, og hann er avgjørdur um, at nógvur peningur er mistur.

- Eg eri komin til, at samlaði missurin hevur verið umleið 2,5 mió krónur, og tað er nógvur peningur.

Fiskaseljarin fýlist eisini á, at Faroe Ship ikki fyrr enn mánamorgunin um 9-tíðina læt frætta frá sær, hvussu støðan var.

### Hevði bøtt um

– Eg haldi, at felagið onkusvegna átti at gjørt alt fyri at gingið fiskaseljarunum á møti – og um ikki annað, so við leigaðum skipi.

Hann heldur, at tað eisini hevði bøtt um støðuna og søluna, um skipið fór seinni avstað við fiskinum enn ætlað.

– Tá hevði prísfallið ikki verið so stórt, sum tað gjørdist, sigur hann.

Fiskaseljarin vísir á, at toskur fekk góðan prís á føroyska marknaðinum mánadagin, meðan tað serliga var hýsan og svartkalvin, sum høvdu stórt prísfall.

- Tey 140 tonsini, sum vóru av hýsu, fóru fyri einar 5 krónur minni fyri kg., enn tey annars høvdu farið - og svartkalvin fór fyri einar 13 krónur minni fyri kg., sigur hann.

# Havtaskuveiðan í stórum vøkstri

**Veiðan eftir havtasku undir Føroyum er rættiliga nógv vaksin seinastu árini, úr stívliga 1600 tonsum í 1996 upp í góð 4.500 tons í 2005**



*Eggini verða gýtt í einum stórum rognbandi*
*Mynd: Fiskivinnuskúlin*

HAVTASKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Veiðan vaks øll árini úr góðum 1600 tonsum í 1996 til og við 1999, tá hon var umleið 2.750 tons. Síðan minkaði veiðan aftur niður í umleið 2.200 tons í 2002.

Árini 2003 til 2005 var aftur rættiliga stórur vøkstur í havtaskuveiðini, sum í 2005 kom upp á stívliga 4.500 tons.

Størri helmingurin av havtaskuni, sum verður veidd undir Føroyum, verður veidd við troli, men í 2000 og 2001 var garnaveiðan á leið líka so stór sum trolveiðan.

Lise H. Ofstad, fiskifrøðingur, sum í nøkur ár hevur granskað viðurskifti við havtasku, hevði áhugaverda framløgu um havtasku og havtaskuveiði á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna fríggjadagin.

Fleiri av næmingunum á skúlanum lýddu á framløguna hjá Lise.

Hendan dagin var eisini lutakast um innkomin fiskamerki, sum Fiskirannsóknarstovan skipaði fyri á Fiskivinnuskúlanum.

Petur Steingrund, fiskifrøðingur og Jákup Andreasen, skúlastjóri, syrgdu fyri, at alt gekk rætt fyri seg, tá ið vinnarin skuldi finnast.

Sambært heimasíðuni hjá Fiskivinnuskúlanum, eru tvinni sløg av havtasku.

Tann vanliga "hvíta havtaskan" hevur hvíta búkhinnu og fæst í landsynningshorninum av Barentshavinum, við Ísland, Føroyar og suður til Gibraltar.

"Svarta havtaskan" hevur svarta búkhinnu og er mest í heitari sjógvi úr Norðsjónum suður til Gibraltar, í Miðjarðarhavinum og í Svartahavinum.

Øll eggini verða gýtt í einum og sonevndum rognbandi, sum vit síggja á tí einu myndini. Hetta rognband kann vera 10 metrar langt og ein metur breitt. Í "bandinum" kunnu vera meira enn ein miljón egg. Bandið og eggini kunnu beint fyri gýting viga meir enn helmingin av allari fiskavektini.

Gýtingarleiðirnar um okkara leiðir eru vestan fyri bretsku oyggjarnar, men eingi gýtingarøki eru funnin í Norðurhøvum.

Vanligasta føðin hjá havtaskuerhvítingsbróðir, svartkjaftur, lítli kongafiskur, flatfiskur, hýsa og toskur.



*Tvinni sløg eru av havtasku*
*Mynd: Fiskivinnuskúlin*